# Odd Fellow letur gávur

Í hesum árinum verður Odd Fellow felagsskapurin í Danmark 125 ár, og í Havn kann Odd Fellow-losjan nr. 1, Ambolturin, halda 17 ára føðingardag.

Í hesum sambandi letur nakrar peningagávur.

Sjálvhjálparbólkurin fyri børn og ung, sum hevur til endamáls at stuðla børnum, ið hava mist foreldur síni við deyða, fær 10.000 krónur.

Kvinnuhúsið fær 5.000 krónur til at stuðla børnum, sum koma í Kvinnuhúsið at búgva eitt skifti. Sama upphædd verður latin Javna til týðing og útgávu av bókini »Hul i hovedet«, ið viðger evnið at vera mongol.

Peningagávur vóru lætnar á móttøku í Losjuni á Grønlandsvegnum seinnapartin í gjár.

# Teir fara at rokast aftur

**Komandi tíðina fer bólkurin Rok at spæla til dans kring landið. Teir leggja fyri í Havn hóskvøldið, og síðani gongur leiðin til Miðvágs og Tvøroyri**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Bólkurin Rok hevur spælt til onkur dansitiltøk seinasta árið, og nú fara teir aftur út at rokast.

Bólkurin fer at spæla í Kagganum í Havn hóskvøldið, og leygarkvøldið spæla teir í bygdahúsinum í Miðvági. Seinni gongur leiðin til Tvøroyi og onnur støð í landinum.

Síðani bólkurin spældi seinast er nýggjur gittarspælari komin við í bólkin. Tað er Johan Ziskason, sum er kendur úr millum annað Mark No Limits. Hann hevur ikki spælt nakað serligt í nøkur ár, men nú fer hann aftur á pallin.

Signar í Homrum, sum var ein av høvuðsmonnunum í bólkinum Kjølar í nítiárunum, er sangari í Rok.

Hinir, sum spæla í bólkinum, eru Albin Ísaksson, trummur og sang, John Johannesen, bass og sang og Tummas Gudmundson, ljómborð.



## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Thorstein Arge**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til,
bæði áðrenn og eftir jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og øll tykkum,
sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna,*
**Marin**

## *Móttøka*

*Bjóðað verður til móttøku í hølunum*
*hjá S&K-felagnum*
*á Traðavegi 20*
*í samband við at S&K-felagið*
*18. oktober hevur 30 ára stovningardag*

*Tað hevði glett okkum at sæð limir, samstarvsfelagar,*
*viðskiftafólk, vinir og kenningar*

*Móttøkan verður:*
*fríggjadagin 17. oktober*
*frá kl. 15.00 – 18.00*

*S&K-felagið*

# Kvinnurnar eru vakrasta landslagið

**Fríggjadagin letur Jógvan Asbjørn Skaale upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Kvinnan er tema í teimum 40 málningunum**

LIST
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Kvinnan er í miðdeplinum á myndunum hjá Jógvani Asbjørn Skaale*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

Nú koma kvinnurnar hjá JAS til Havnar.

Eftir at listamálarin Jógvan Asbjørn Skaale hevur havt framsýningar í Fuglafirði og á Tvøroyri, fer hann nú at hava framsýning í høvuðsstaðnum.

Fríggjadagin klokkan 14.00 letur framsýningin upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Okkurt um 40 málningar verða við, og kvinnan er miðdepilin á øllum myndunum.

– Allir føroyskir listamenn mála landsløg, og eg haldi, at kvinnan er tað vakrasta landslagið, sum vit eiga, sigur Jógvan Asbjørn Skaale.

## Góðar umstøður

Hann hevur málað nógv seinastu tíðina, og arbeiðsumstøðurnar hjá honum eru góðar.

Fyri hálvumøðrum ári síðani keypti hann Fjalsgarð í Oyndarfirði, og har hevur hann góðar umstøður til listarligt arbeiðið.

– Eg havi eina høll upp á 100 fermetrar, og so gott pláss havi eg ongantíð áður havt. Eg eri nógv í Oyndafirði og máli, sigur Jógvan Asbjørn Skaale.

Og tað, sum kemur burtur úr hesum arbeiði, kunnu fólk síggja í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin hevur opið fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin.



# Sjónvarps-læknin til Føroya




*Peter Qvortrup Geisling er kanska kendasti læknin í Danmark, og tað er hann orsaka av sjónvarpssendingini »Læknin hevur orðið«*

**Fyrst í komandi ári kemur ein av best kendu læknunum í Danmark til Føroya at hava fyrilestrar**

LÆKNIN
*Eyðun Klakkstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Síðst í januar mánaði fer læknin at hava orðið í Føroyum.

Og tað er ikki ein og hvørt lækni.

Tað er »læknin« sjálvur.

Peter Qvortrup Geisling.

Nógv kenna ivaleyst navnið, men tey, sum ikki kenna navnið, vita hóast alt, hvør maðurin er, tá ið tað verður lagt afturat, at hann er vertur í sjónvarpssendingini »Læknin hevur orðið«, sum Danmarks Radio framleiðir.

Hendan væl umtókta sending verður eisini sýnd í føroyskum sjónvarpi.

## Norðoyggjar og Havn

Peter Qvortrup Geisling er tungusnjallur, og hann er nógv biðin til fyrilestrar og sum orðstýrari til fundir um heilsuviðurskifti.

Og tað er sum fyrilestrahaldari, at Peter Qvortrup kemur til Føroya síðst í január mánaði næsta ár.

Peter Qvortrup kemur til Føroya 29. januar, og hann verður her í landinum fram til 2. februar.

Læknin fer at hava fyrilestur í Norðoyggjum og í Havn, og møguliga verða tað fleiri enn tveir fyrilestrar á skránni. Endaliga skráin fyri vitjanina er ikki løgd enn.

Tað er felagið IRIS í Klaksvík, sum stendur fyri vitjanini í Føroyum.

# Fyrilestrar um hæmodialysu

Hæmodialysan á B7 á Landssjúkrahúsinum hevur nú 10 ár á baki, og í tí sambandi verða fyrilestrar í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum 21. oktober frá kl. 9.15.

Fyrrapartin eru øll fakfólk í føroyska heilsuverkinum vælkomin, og seinnapartin sleppur almenningurin framat.

Sjálvur 10 ára dagurin er beint fyri jól, tann 20 desember, men í samband við serliga vitjan í oktober mánaði verður dagurin hildin nú.

Tey, sum fara at hava fyrilestrar, eru Heðin Thomsen, yvirlækni, Odny Thomsen, forkvinna í Nýrafelagnum, Elsebeth Hildebrand, dialysu-sjúkrarøktarfrøðingur, Henrik Ærenlund Jensen, nefrologur og Ulla Finne, kostráðgevi.

J. Broncksgøta 37 · Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

JÓLABORÐHALD

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn
úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:
- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

Úr havinum
Stórt sildaborð
Roykt og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

Alskyns steikir so sum:
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

Flógvir rættir so sum:
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

Stórt ostaborð
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

Dessertborð við m.a:
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.

20. – 24. Nov:
Undirhald: Robert McBirnie
Orkestur: Jóan Magnus Band

27. Nov.– 01.Des:
Undirhald: Hilmar Jan Hansen
Orkestur: Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

04. – 08. Des:
Undirhald: Robert Mc.Birnie
Orkestur: Vestmenn

11. – 15. Des:
Undirhald: Hilmar Jan Hansen
Orkestur: Terje Rasmussen Band

JÓLAKEYP
HUGNI

Keypið jólagávurnar á ferðini
Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.

SMYRIL LINE